# TILTØK

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Jógvan Páll Sevdal talar. Evni: Familjan. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Berøa, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønar- og uppbyggingarmøti. Leygarkvøldið kl. 21.00 Jólafest fyri tey ungu. Sunnudagin kl. 11.30 Breyðbróting, kl. 15.00 Jólafest fyri tey yngru børnini til og við 3. skúlaflokk. Kl. 19.00 Jólafest fyri tey eldru børnini frá 4. skúlaflokki.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake, fólk frá YWAM-Føroyar luttaka. Sunnudagin kl. 17.00 Familjujólafest (nátturði aftaná, øll taka við). Vælkomin í Kelduna www.keldan.fo

**Kongshavnar Kvinnufelag**
Jólahugni fyri limir við gesti verður mikukvøldið 7. des. kl. 19.00.

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Mikudagin kl. 6.15 Morgunbøn, kl. 20.00 Bønarmøti. Hósdagin kl. 6.15 Morgunbøn. Fríggjadagin kl. 6.15 Morgunbøn, kl. 20.30 Ungdómsmøti við Eivinn Bringsberg og David Mørkøre. Leygarmorgun kl. 10.00 Bøn og kl. 21.00 UngdómsRóp. Sunnudag kl. 14.00 er Jólahugni hjá sunnudagsskúlanum og kl. 18.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími við Thorleif Johannesen, 1. kor. kap. 15. Hósdagin kl. 19.00 Bønarløta. Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18-19.45 Temakvøld, 2. partur um Luther og tað luthersku læruna v/ Bergur Debes Joensen. Nátturði aftaná. 2. partur kl. 21.00-22.00. Øll eru vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ elstaráðnum. Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria fríggjakvøldið 9. des. kl. 20.00. Lív og Dánjal á Dul Jacobsen luttaka. Møti er fyri bæði kvinnur og menn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíblutími, 2. Kor. 9. kap. Hóskvøldið kl. 20.00 hevur Sjómanskvinnuringurin jólahugna. Havi jólapakka við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Mikukvøldið 14. des. kl. 18.30 verður jólahugni saman við Tilhaldinum. Borðreitt verður við heitum mati og kaffi og køkum aftaná. Ymiskt verður til undirhald, sangur, søga og amerikanskt lottaríspæl. Tey, ið hava hug at vera við kunnu siga frá á tlf. 361204 ella á tlf. 361586 innan 10. des. Kostnaður 100 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 17.00 Andakt á Eldrasambýlinum í Vági. Streingjakórið luttekur við sangi. Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti v/ Eingrím Holm, kl. 18.00 Evangel. møti v/ Barnaansing, Eingrím Holm talar. Øll eru vælkomin. Týsdag kl. 18.00 Junior-Klubbur, kl. 20.00 Kórið øvar fyri seinastu ferð fyri jól. Mikudag kl. 18.00 Junior-møti.

**Missiónsvikan í Porkeri**
Um Gud vil verður Missiónsvikan í prokeri frá 17. til 22. januar 2006.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. fundur - Fríðtór Debes luttekur á báðum møtunum. Mánadagin kl. 20.00 Bíbliutími og bøn.

**Vágs Pensionistafelag**
hevur jólaveitslu á Bakkanum leygardagin 10. des. kl. 18.30. Kostnaður 100 kr. pr. lim. Tekning hjá nevndini áðrenn 8. des. Minst til jólapakkarnar. Gávur vera til lutaseðlasøluna.

**Føroysk møtir í Suðurjytlandi**
Evangeliskir fundir í hesum býnum!
***Esbjerg:*** Fríggjakvøldið 9. dec. 2005, kl. 19.30. Evangeliskur Fundur í Sæddingcenter.
***Sønderborg:*** Leygarkvøldið 10. dec. 2005, kl. 19.00 Evangeliskur fundur og Sunnudagin 11. dec. kl. 10.00 Breyðbróting. Á Søndre Landevej 28.
***Vejle:*** Sunnudagin 11. dec. 2005, kl. 16.00 Breyðbróting og kl. 17.00 Evangeliskur Fundur, í Salinum hjá Frelsunarherinum, í Staldgårdsgade 4. Talarar verða: Rógvi Joensen og aðrir. Góður sangur og tónleikur, har Kvartettin "VITIN" úr Klaksvík luttekur. Aftaná møtini, bjóða vit ein góðan drekkamunn við føroyskum viðskera og børnini fáa karamallur.
***Samkoman »MALTA« Hirtshals***

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00. Teldupostur: tilhald@torshavn.fo Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 5. des.*
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45: Enskt á byrjunarstigi 1, Hilda Frýdal
kl. 14.00-17.00: Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart, kánus o.o. spøl.
**Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan mikudag og fríggjadag. Tilmelding mánadag á tlf. 316491. 9. des. verður jólaborð í Tilhaldinum, tilm. tlf. 316491.**
*Týsdagin 6. des.*
kl. 10.00-11.30: Vit syngja, Òli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00 Børn frá Tórshavnar Musikkskúla vitja
*Mikudagin 7. des.*
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 10.00-17.00: **Hondarbeiðið, dominobindin o.a.** Vegleiðing á staðnum
*Hósdagin 8. des.*
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45: Enskt á byrjunarstigi 2, Àsmundur Johannesen
kl. 14.00-17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00-16.00: Boccia, Alma Poulsen
*Fríggjadagin 9. des.*
kl. 10.00-13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Jólaborð. **Minnist til pakkan til pakkaspælið.**
kl. 10.00-12.00 **Máling og tekning. (Havi tilfar við).** Vegleiðing er á staðnum.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og onnur spøl
***Mikudag***
Vit gera jólaprýði
***Hósdag***
Fimleikur
Hvønn dag drekka við nýbakaðum.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðuni til taks.
***Mikudagin 6. des.:***
Prikkatøving við Maju Horn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Mánadagur 5. des.***
Fimleikur. Vit siga orðatøk. Døgurði er mikudag kl. 12.00. Tekning innan týsdagin á middegi á tlf. 448518 ella 222922. Vælkomin.
***Týsdagur 6. des.***
Prát og sangur. Vit spæla Kánus.
***Mikudagur 7. des.***
Kl. 9.45. Matgerð v. Varnu av Rana. Kl. 12. Døgurði. Til ber at koma til døgurða sum gestur. Tekning innan týsdagin á middegi á tlf. 448518 ella 222922. Kl.15. Opið sum vanligt. Kl. 16. Boccia.
***Hósdagur 8. des.***
Myndaskering v. Hjalmar Olsen.
***Fríggjadagur 9. des.***
Byrjandi enskt v/ Anette Gaardlykke
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið á Toftum**
*tlf. 448690*
*er opið frá mánadag-fríggjadag, kl 14.00-18.00.*
***Mánadagin 5. des.***
Stongt
***Týsdagin 6. des.***
Telduprát við Derdrei Hansen
***Mikudagin 7. des.***
Sangur kl. 15.00 v/ Martin Restorff
***Hósdagin 8. des.***
Jólahugni, vit byrja kl. 16.00
***Fríggjadagin 9. des.***
BOCCIA frá kl. 15.00-16.00, Harry Hansen.
***Vit hava opið til 16. des. og lata upp aftur 4. januar 2006.***
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið á Toftum..*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00. Tlf. 318586.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.


Havnar Bio

kall Coca-Cola




I dine sko

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 07.12 | kl. 21.45 | |
| Hósdag | 08.12 | kl. 21.45 | |




Pedderson & Findus 3 - Nissemaskinen

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 07.12 | kl. 18.00 | |
| Hósdag | 08.12 | kl. 18.00 | |




Harry Potter og flammernes pokal

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 07.12 | kl. 18.30 | |
| Hósdag | 08.12 | kl. 18.30 | |




The longest Yard

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Mikudag | 07.12 | kl. 19.45 | kl. 22.15 | *Seinasta sýning* |
| Hósdag | 08.12 | kl. 19.45 | kl. 22.15 | |

KOMANDI FILMAR:

*FRUMSÝNING*

Just like Heaven

Fríggjadag 09.12

King Kong *HEIMSFRUMSÝNING*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Mikudag | 14.12 | kl. 00.01 | kl. 19.00 | kl. 22.45 |

*Forsølan er byrjað*

www.bio.fo • Telefon 31 19 56